## DAGSINS MEINING

# Anna Lindh

Tað er ein heilt ófatiligur sorgarleikur, ið hevur rakt Svøríki við morðinum á Onnu Lindh. Hetta er ein persónligur sorgarleikir fyri mann og synir. Hetta er ein politiskur sorgarleikur fyri fólkaræðið. Drápið er annað álopið á ta sermerktu politisku skipan, sum vit í umleið hundrað ár hava havt í Norðurlondum. Fyrra álopi var Palmemorðið, sum ikki varð uppklárað.

Henda politiska skipan, sum byggir á álit og opinleika, altjóða solidaritet og dirvi til á uttanríkispolitiska pallinum at seta seg upp ímóti harðræðisligum politiskum atburði uttan mun til, hvaðan hesin atburður kom. Hendan skipan er einastandandi í øllum heiminum, og svenski javnaðarflokkurin hevur í heila øld verið heitasti talsmaður fyri júst hesari skipan við opinleika og áliti. Anna Lindh var sannførd talskvinna fyri hesi skipan. Hon førdi uttan at himprast linjuna hjá Erlander og Palme víðari. Men hon megnaði meira enn tað, hon megnaði at nútímansgera svenskan uttanríkispolitikk og hon megnaði at tilføra Europa eina sterka sosiala og solidariska dimensión. Solidariteturin skudi ikki bert venda inneftir í EU men eisini úteftir mótvegis Triðja Heiminum.Anna Lindh segði frá, uttan mun til hvør móttakarin var og hon lat seg hvørki kúga av USA ella av nøkrum av teimum meria ella minni ivasomu monnunum, sum standa á odda í ávísum EU londum.

Anna Lindh hevði stórar, bjartar og djarvar visiónir fyri Svøríki, ikki bert á uttanríkispolitiska økinum, men eisini á innanríkispolitiska økinum. Hon helt trúføst fast um tær upprunaligu sosialdemokratisku hugsjónirnar, samstundis sum hon hevði evnini til at tillaga hesar hugsjónir til nútíðarsamfelagið. Hetta var kanska ein orsøkin til ta mangan hatsku og bondsku skriving móti hennara persóni og móti hennara sjónarmiðum og hugsjónum. Anna Lindh hevði havt ivaleyst eina stóra framtíð heima í Svøríki so væl sum uttanlands, um henni hevði verið lív lagað.

Anna Lindh var sterk, klók og djørv, viljaføst og sum menniskja var hon sermerkt í orðsins mest positiva týdningi. Hon hoyrdi til ein bólk av trúgvum og heitum Føroyavinum í svenska javnaðarflokkinum. Anna Lindh vitjaði sum ung í Føroyum, har hon átti góðar vinir serstakliga í tí SU-umhvørvi, ið var politiskt sera virkið og livandi í sjeyti og í áttatiárunum. Hon verður nógv saknað á politiska leikpallinum tað veri seg heima í Svøríki eins væl og á altjóða støði. Maður og synir hava mist eina góða konu og eina góða og fyrimyndarliga móðir. Svøríki og Norðanlond hava mist ein dugnaligan politikara og eitt stórt og gott menniskja.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Føroyska Sjómanskirkjan

**Jógvan Fríðriksson**
*Gjaranes 10. sept. 2003*



Hin 14. september 2003 varpar hin Føroyska Sjómanskirkjan (FSK) ljós á søguna og arbeiðið hjá sjómanskirkjuni. FSK varð stovnað í Runavík hin 8. juli 1981. Tess vegna hava vit valt Glyvra kirkju sum karm um hátíðargudstænastuna. Umboð fyri kirkjuráðini, prestar og onnur innboðin vera til gudstænastuna saman við kirkjuliðnum á staðnum.

FSK virkar innan karmar fólkakirkjunnar, ja, er ein partur av hennara virksemi. Vit eru í tøttum samstarvi við Donsku Sjómanskirkjuna (DSK). Vit eru í samvinnu við norðurlond í altjóða høpi so at skilja, at vit sum kirkja virka millum altjóða sjófólk. Á sama hátt útinna aðrar sjómanskirkjur tænastu millum føroysk sjófólk.

FSK ger ikki mun á tjóðskapi, fólkasløgum og húðaliti. Vit virka á kristnum grundarlagi í manngóðum verki. Vit bera orðið um Jesus Krist og ynskja at vera sjófólki, fastbúgvandi og vitjandi til tænastu.

Í nógv ár hevur FSK havt fólk úti í teimum donsku sjómanskirkjunum. Talan er um assistentar og húsmøður. Eitt tíðarskeið vóru vit í San Pedro í Los Angeles. Hetta var í samvinnu við norsku sjómanskirkjuna. Arbeiðið verður stuðlað av kirkjunum, gávum frá einstaklingum og vinnuligum virksemi.

Í 2002 játtaði Føroya Løgting FSK ein árligan stuðul til ein sjómansprest í Hull. Hesin peningur verður goldin FSK sum ein blokkstuðul. Avtala varð gjørd við DSK um eitt samstarv. Samstarvið ber í sær tríggjar eindir: Tað staðbundnu kirkjuna í Hull, FSK og DSK. Starvsetan og skipan av starvinum er danskt málsøki, meðan Hull ger eitt viðmæli og FSK innstillar.

Raksturin av sjómanskirkjuni í Hull kostar árliga umleið eina millión krónur. Harafturat er vert at varnast, at ein grunnur eigur bygningin saman við DSK. Soleiðis sæð koma vit til skorin klæðir og skulu ikki hugsa um kirkju ella íbúð til prestin. Torført er at seta tøl á hetta virðið, tí vit spara eina íløgu í bygning ella leigu. FSK metir, at um vit umrokna hesi forrættindi til pening, so gjalda vit føroyingar væl minni enn helvtina av tí, ið sjómanskirkjan í Hull árliga kostar.

Sjómanspresturin í Hull er tekin um positivan hugburð og nýhugsan. Politiski myndugleikin í Føroyum og umsitingin hava í samstarvið við FSK gjørt eitt gott arbeiði. Kirkjuligi myndugleikin sýndi framtøkni, tá starvið varð viðmælt. Avtalan við DSK verður endurskoðað um tvey ár, og til ta tíð eru møguligar ábøtur verdar at umhugsa.

Sjómanskirkjan ynskir at vera eitt friðskjól hjá tí siglandi fólkinum, tá komið verður í fremmanda havn. Til tess krevst eitt gott bakland, og FSK takkar teim mongu, sum hava dugnað sjómanskirkjuni í forbøn, verki og fíggjarligum stuðli.

Hugaligt er at síggja Merkið veittra í fremmandum landi. Ímyndin av føroyskari mentan á krossristum dúki. Samstarv í norðurlendskum og altjóða høpi er við til at økja um sjónarringin samstundis sum ávarað verður ímóti trongskygni. Sjófólkið siglir á øllum heimshøvum. Eingin tjóð kann vera allastaðni. Samstarv er neyðugt.

# Almennur fyrilestur á Fróðskaparsetrinum

TÍÐINDASKRIV

Hóskvøldið 11. september kl. 20 skipa Fróðskaparsetrið og Føroya Fróðskaparfelag fyri almennum fyrilestri.

Margrét Jónsdóttir, dosentur á Háskóla Íslands, heldur fyrilestur, ið hon kallar: *Íslendsk nýmyndan - sagnorðið 'væða' í samansetingum.*

Tað fornískendska sagnorðið væða kemur av navnorðinum váð, sbr. t.d. rekkjuváð, nútíðaríslendskt voð. Nógv samansett sagnorð á íslendskum enda við -væða, t.d. einkavæða, hnattvæða, rafvæða, siðvæða, tæknivæða og tölvuvæða. Merkingin er altíð tann sama: t.d. merkir rafvæða at 'ravmagnsbúgva'. Fyrstu sagnorðini av hesum slag gera vart við seg um miðja 20. øld. Nú veksur talið av hesum orðum skjótt, og tann gongdin hevur samband við ta alsamt vaksandi tøknimenningina. Av nýggjum samansetingum ber til at nevna Windows-væða og ADSL-væða. Í fyrilestrinum verður røtt um søguna hjá hesum sagnorðunum og ymsar spurningar teimum viðvíkjandi.

Margrét Jónsdóttir tók cand. mag.-prógv í íslendskari málfrøði við Háskóla Íslands 1981 og hevur síðani starvast har. Hon er dosentur í "Íslendskum fyri útlendskar studentar". Margrét hevur skrivað undirvísingartilfar fyri útlendskar studentar, einsamøll og saman við øðrum. Hon hevur skrivað nøgd av greinum um málfrøðilig evni, bæði av søguligum og samtíðarligum slag, flestar innan fyri bendingarfrøði.

Fyrilesturin er á íslendskum. Úthendi (handouts) verða latin.

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerkingar til skriving um sjómansprestastarvið

**Høgni Hoydal**
*landsstýrismaður*



Í lesarabrøvum í bløðunum eru komnar atfinningar móti Mentamálaráðnum og móti landsstýrismanninum í mentamálum í sambandi við setan av sjómansprestastarvinum í Hull. Í hesum sambandi verða hesar viðmerkingar gjørdar til atfinningarnar.

Málið um føroyskan sjómansprest varð reist fyri Mentamálaráðnum 5. juli 2001, tá Føroyska Sjómanskirkjan sendi áheitan til Landsstýrið um at skipa eitt føroyskt sjómansprestastarv. Føroya biskupur, Hans Jacob Joensen, gav áheitanini sítt besta viðmæli. Áðrenn politisk støða varð tikin til málið, var ein arbeiðsbólkur settur at lýsa og greina allan spurningin um eitt føroyskt sjómansprestastarv. Arbeiðsbólkurin skrivaði eitt útgreinandi álit, og álitið var handað landsstýrismanninum tann 21. desember 2001. Seinni varð álitið latið øllum løgtingslimum.

Í álitinum var arbeitt við tveimum møguleikum:

1) at stovnseta sjómansprestastarvið undir føroyskari fólkakirkju, ella
2) at skipa sjómansprestastarvið undir verandi skipan.

Tað er óneyðugt at nevna, at landsstýrismaðurin í mentamálum vildi ynskt, at Fólkakirkjan varð yvirtikin, og at vit sostatt kundu arbeitt við fyrsta møguleikanum, men økið er tíverri ikki yvirtikið, og tí muga vit liva við verandi skipan.

Um sjómansprestastarvið skuldi stovnast, áður enn Fólkakirkjan varð yvirtikin, mátti hetta sostatt gerast undir verandi skipan, har allir prestar (og sjómansprestar) verða settir í Danmark eftir donskum sáttmálum. Hetta merkir t.d., at lønarviðurskifti, eftirlønir, trygging, røkt av starvsfólki o.s.fr. eru donsk málsøki burturav. Undir verandi skipan, tvs. so leingi Fólkakirkjan ikki er føroyskt málsøki, er setanarmyndugleikin hjá sjómansprestinum hjá Donsku Sjómanskirkjuni og ikki her í Føroyum. Herumframt skulu danskir sjómansprestar lúka somu treytir (og hava somu rættindi) sum danskir fólkakirkjuprestar, ið eru settir undir danska Kirkjumálaráðnum.

Føroya Landsstýri vildi vera við til at hjálpa landsmonnum uttanlands (sjómonnum, lesandi og føroyingum annars), og tí var uppskot um játtan til stuðul til Føroysku Sjómanskirkjuna við á eykajáttanar-løgtingslógini fyri februar 2002. Sum grundarlag fyri støðutakan til játtanina lá notat og álitið, sum arbeiðsbólkurin hevði handað landsstýrismanninum.

Í notatinum stendur greitt, at Danska Sjómanskirkjan er setanarmyndugleiki, og at uppgávan hjá Føroysku Sjómanskirkjuni er at útvega fólk, og at endurrinda Donsku Sjómanskirkjuni tann partin av útreiðslunum, sum partarnir gera avtalu um. Í notatinum stendur eisini, at Føroyska Sjómanskirkjan ynskir, at føroyingar sjálvir gjalda lønina til ein sjómansprest, soleiðis at føroyingar eisini kunnu avgera, hvør ið settur verður. Og í álitinum stendur at lesa á s. 12: "Verður stuðul játtaður føroysku sjómanskirkjuni, innan fólkakirkjan er yvirtikin, so verður stuðulin at gjalda sum blokkstuðul til føroysku sjómanskirkjuna. Føroyska sjómanskirkjan ger neyðugar avtalur við donsku sjómanskirkjuna um setanarviðurskifti og starvsøkið hjá sjómansprestí."

Føroyska Sjómanskirkjan gjørdi samstarvsavtalu við Donsku Sjómanskirkjuna. Mentamálaráðið hevur, eftir tilmæli frá Føroysku Sjómanskirkjuni, góðkent hesa avtalu. Samstarvsavtalan millum føroysku og donsku sjómanskirkjuna hevur við sær, at føroyingar endurrinda Donsku Sjómanskirkjuni fyri kostnaðin av lønini til sjálvan prestin, og danir gjalda restina av rakstrinum av kirkjuni, herundir løn til hjálparfólk, bústað hjá presti, leigu av kirkju v.m.

Í samstarvsavtaluni millum føroysku og donsku Sjómanskirkjuna stendur, at Føroyska Sjómanskirkjan og kirkjuliðið í Hull skula ávíkavist innstilla og koma við úttalilsi um setan av sjómansprestí, og at Danska Sjómanskirkjan setur starvið.

So leingi sum Fólkakirkjan er danskt málsøki, er og verður setanarmyndugleikin í Danmark. Tað hevur ongantíð verið ætlanin at flyta setanarmyndugleikan til Føroysku Sjómanskirkjuna ella til føroyskan myndugleika, so leingi sum fólkakirkjan ikki er yvirtikin. Mentamálaráðið og landsstýrismaðurin hava tískil heilt einfalt ikki heimild at leggja seg út í setanina.

Tað hevur eisini verið ført fram, at føroyski skattgjaldarin skal gjalda fyri hátíðarhald hjá Føroysku Sjómanskirkjuni sunnudagin tann 14. september á Glyvrum. Hetta er ikki beint. Føroyska Sjómanskirkjan hevur fingið markaðan stuðul á Løgtingsfíggjarlógini til at gjalda løn til sjómansprestin í Hull. Grannskoðaður roknskapur fyri stuðulin fyriliggur, og vísir hesin roknskapur, hvussu nógv er nýtt til løn. Ónýtt játtan, tvs. alt avlopið, verður at flyta aftur til landskassan. Hátíðarhaldið á Glyvrum verður ikki goldið av hesi játtan, og sostatt ikki av føroyska skattgjaldaranum.

Eg skal enn einaferð loyva mær at nevna, at eg fyrst og fremst vildi ynskt, at vit høvdu fingið okkara egnu føroysku fólkakirkju, og harvið eina føroyska sjómanskirkju, sum kundi samstarvað á jøvnum føti við norðurlendsku sjómanskirkjurnar. So kundu vit sloppið undan slíkum fløktum loysnum sum her við sjómansprestinum í Hull. Men soleiðis gekk tað ikki, og tí valdu vit, eftir tilmæli frá Føroysku Sjómanskirkjuni, ta næstbestu loysnina. Hetta varð gjørt, fyri ikki at forkoma málinum. So leingi Fólkakirkjan ikki er føroyskt málsøki, er og verður sjálvur setanarmyndugleikin uttan fyri okkara myndugleikaøki, og hetta fær landsstýrismaðurin einki gjørt við. Hetta merkir so eisini, at ein møgulig kæra frá umsøkjara um setan av sjómansprestastarvinum eigur at verða send til Donsku Sjómanskirkjuna ella møguliga til danska umboðsmannin.

Hinvegin vil eg fegin fáa lýst, hvat ið er farið fram í mun til sjálva avtaluna, eitt nú um nakað er at viðmerkja um avtalugrundarlagið, og fari eg tí at biðja um eina frágreiðing frá Føroysku Sjómanskirkjuni hesum viðvíkjandi. Haraftrurat haldi eg, at tað er rætt longu nú at eftirmeta avtaluna, og ætli eg mær tí at heita á tann arbeiðsbólkin, ið skrivaði álit um føroyska sjómans-prestastarvið, at taka sær av hesum.

Hetta mál er ein avleiðing av, at kirkjan ikki er yvirtikin. Men kanska verður støðan ein onnur, tá starvið skal setast av nýggjum um trý ár. Tá hava vit vónandi eina føroyska fólkakirkju, sum kann samstarva á jøvnum føti við eitt nú donsku fólkakirkjuna og donsku sjómanskirkjuna.

# Vetrarskráin hjá Føroyahúsinum

TÍÐINDASKRIV
*frá Føroyahúsinum*

Feløgini og Føroyahúsið eru farin undir vetrarskránna, sum hevur tilboð av mongum slag. Tó er her at siga, at vit kunna borðreiða, men vit kunna ikki noyða fólk til at koma innar. Húsið er fyrst og fremst karmur um tiltøkini. Øllum stendur í boði at koma við hugskotum og tiltøkum, sum kunna fjøltátta tilboðini í húsinum, sigur leiðarin, sum tó heldur at vanliga er undirtøkan góð til tey tiltøkini, sum eru. Húsið var fullsett leygarkvøldið til dansin, sum Fótatraðk skipaði fyri. t.v.s uml. hálvtriðjahundrað fólk inni. Longu í august hava verið týsdagsdøgverðar, reseptión og fótbóltsdystur á stórskýggja, har eini 180 fólk vóru til dystin millum Føroyar og Ísland.

**Reseptión: Løgini**

Fríggjakvøldið 12. september verður reseptión, nú stórverkið Løgini til Føroya Kvæði er útkomin. Eftir tógvið stríð í út við fimm ár eydnaðist at fáa hetta verkið úr hondum greitt um ólavsøkumundið. Marianne Clausen kórdirigentur og tónleikagranskari hevur verið rithøvundi og ritstjóri. Marianne og faðir hennara Claus Clausen hava bæði savnað saman vísu- og sálmaløg í Føroyum og á annan hátt víst føroyskum sangi og tónleiki ans. Fyri sítt virki fekk faðirin vakra steinmynd fra Føroya Landsstýri í 1963. Hetta relieff av Janus Kamban hongur nú í Føroyahúsinum og er gáva frá Marianne og móðir hennara, tá ið faðirin var farin.

Føroyahúsið og Marianne skipa fyri reseptiónini. Kaj Larsen, sum er kønur innan kvæðasavningina, fer at hugleiða um hetta og tað nýggja verkið. Marianne fer sjálv at greiða frá sínum arbeiði við lagasavningini. Húsakórið, sum hon stjórnaði í 22 ár, fer at syngja tríggjar sangir við kvæðalag og Fótatraðk fer upp á gólv. Eisini verður borðreitt við sneisabitum og øðrum undir respetiónini. Bókin verður sjálvandi at fáa til keyps. Tíverri er tað tó hent, at meginparturin av upplagnum skal prentast umaftur, tí fleiri lýti eru í stórum parti. Hendan prentingin er farin í gongd.

**Danir vilja fegnir vita meira um Føroyar**

Ikki so sjáldan venda skúlar, feløg og onnur sær til okkara at fáa meira at vita um føroysk viðurskifti og um sjálvt húsið. Nú ein dagin var ein ungur arkitektur. Hon skuldi tekna eini koreansk kulturhús og var tí og leitaði eftir inspiratiónum hjá okkum. Týsdagin 16. septembur vitja fjøruti fólk við Norrøna Felagnum í Lyngby. Tey skula eta kalvadøgverða saman við okkum og eftir tað fer Sjúrður Skaale at siga frá um Føroyar. Hendan dagin vitjar ein annar kenningur. Tað er Stanley Samuelsen úr Fuglafirði sum saman við vinmanninum Hans Ericsson úr Svøríki fara at syngja fyri gestunum hetta kvøldið, har rokna verður við eini hundrað fólkum til kvøldið.




Onkuntíð koma skúlaflokkar inn og fáa frásøgn í húsinum. Men stundum fer leiðarin sjálvur ella sama við øðrum út á onkun skúla ella okkurt felag at siga frá. Tað kann vera ein Rotary, rithøvundafelag, skótabólkur, vælgerandi bólkar av ymsum slag o.a.

**Listafólk, rithøvundar og veitslur**

Í september hevur Fanny Mouritsen úr Havn og Henry Mieseles úr New York framsýning í Stórustovu. Undan teimum vóru Niels Salmony aúr Trongisvági og Bjørn Lerberg úr Noreg. Og soleiðis skiftir. Men mong av hesum fólkum búgva nú í Danmørkini. Fanny í Sindal og Henry í Keypmannahavn. Føroyahúsið hevur hesar framsýningar, men Listafelagið fer eisini at hava tvær framsýningar í heyst møguliga saman við kafékvøldi, sum vísir seg at vera sera heppin máti. Annika Brimheim er formaður í føroyska Listafelagnum í Keypmannahavn.

Í fjørvetur vóru Oyggjarnar tema. Tað vísti sega at hava góðan áhuga. Onkur oyggj kom ikki rættiliga upp í part tá, so tær koma nú í vetur. Nólsoyggin er á skránni síðst í septembur. Og nøkur munna eisini bíða eftir einum hugnaligum bingokvøldið, sum samtíðis er til frama fyri húsið. Fýra slík kvøld vera í heyst. Tað fyrsta verður 23. septemb-er.

Í oktobur eru fleiri stór tiltøk so sum tann kenda vínveitslan 4. oktobur, har Pauli Joensen er vínkennarin og Stina Gudmundsdóttir kokkurin. Tá fara Julianne Boys at spæla og Húsakórið skipar fyri saman við Føroyahúsinum. Kvinnufelagið skipar fyrilestri um Villiam Heinesen og 10. oktobur verður aftur mentanarnátt í Keypmannahavn, har vit altíð eru við. Fótatraðk fer seinni í mánaðinum at skipa fyri almennum føroyskum dansi og eftir mánaðarskiftið fer Ítróttarfelagið at hava ársveitslu og manningin á Tvørábátinum lundaveitslu.